# Hotel Eiði

Nú nærkast summarið rættiliga, og gistingarhúsini kring landið byrja at brynja seg til útlendsku gestirnar, sum oftast koma til landið í summarmánaðunum. Hotel Eiði er eisini millum gistingarhúsini, sum hava brynja seg væl í vetur. Tey hava nevniliga havt ávísar umvælingar á gistingarhúsinum.

- Ja, vit hava umvælt ein part av hotellinum, sigur Malan Rubeksen, sum er dagligur leiðari á Hotel Eiði.

- Vit hava 16 kømur á gistingarhúsinum, og tey eru øll gjørd í stand. Nú eru bæði vesi og bað í øllum kømrunum, so tey eru væl betur enn í fjør.

Í fjør hevði Hotel Eiði eisini eina væl umtókta buffet hvørt sunnukvøld, og hetta ætla tey at halda fram við. Í ár verður buffetin tó víðkað til tvey kvøld um vikuna.

- Buffetin hjá okkum gekk ómetaliga væl í fjør, tí hava vit valt at royna hana aftur í ár. Í fjør høvdu vit tó bert buffet sunnukvøld, men í ár fara vit at hava hana bæði leygarkvøld og sunnukvøld, sigur Malan.

Annars hevur Hotel Eiði dagsins rætt um dagin á sumri, meðan fólk kunnu keypa a la carte um kvøldið. Her hava tey eitt stórt úrval av fiski, tí hetta dáma útlendingum ofta best. Harafturat hjálpir gistingarhúsið eisini gestunum at fyrireika túrar í økinum, so teir kunnu uppliva vøkru náttúruna í økinum.


*Hotel Eiði hevur havt ávísar umvælingar í vetur, og m.a. er øll kømrini á gistingarhúsinum sett í stand. So nú eru umstøðurnar nógv betri*




















